## Pedagogar

**Søkt verður eftir:**

- 2 pedagogum, 30 t. um vikuna, til eina stovu við 12 vøggustovubørnum frá 1. sept. 2002 ella eftir nærri avtalu.
- 1 pedagogi, 35 t. um vikuna, til eina stovu við 18 barnagarðsbørnum frá 1. okt. 2002 til 30. sept. 2003, vegna farloyvi.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum er normeraður til 42 barnagarðsbørn, 12 vøggustovubørn, 8 pedagogar og 4 hjálparfólk.

Endamál stovnsins er við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast bæði persónliga og saman við øðrum í tryggum og stimbrandi umhvørvi og í góðum samstarvi og samskifti millum foreldur og starvsfólk og starvsfólk sínámillum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin til 1. mars 2003.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 10. aug. 2002.

**Kongshavnar Barnagarður og Vøggustova**
Heiðavegur · Postboks 119
FO-600 Saltangará

## Frá Eysturskúlanum

Søkt verður eftir sáttmálasettum tíðaravmarkaðum lærara skúlaárið 2002/2003 at undirvísa í ítrótti, møguleiki er fyri fullum starvi.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðdis Eidesgaard, skúlastjóra á tlf. 214752.

Umsóknir skulu sendast til Eysturskúlan og skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 9. aug.

**Skúlastýrið í Eysturskúlanum**

## Klárgerings- og ørindafólk

Vit sóknast eftir klárgerings- og ørindafólki at byrja skjótast tilber.

Koyrikort til persónbil krevst.

Ivan Johansen Bilar

Sosialurin -har tað hendir

Lágargarður

## Fysio- og ergoterapeutur

Í sambandi við at fyribyrgjandi tilboðini á Dagstovninum á Lágargarði skulu økjast, eru 2 nýnormeraði størv leys at søkja, og lýsa vit eftir einum fysioterapeuti og einum ergoterapeuti.

**Fysioterapeuturin skal bjóða:**

- fysiurgiskar viðgerðir og venjingar bæði til einstaklingar og bólkar
- metingar og tillaðingar úti í heimunum hjá sjálvum brúkaranum, hetta í tøttum samstarvi við Heimarøktina
- vegleiðing og upplæring í nýtslu av hjálpartólum
- vegleiðing og upplæring í arbeiðshættum og flytingum til starvsfólk bæði á stovninum og í Heimarøktini.

**Ergoterapeuturin skal bjóða:**

- ADL metingar og venjingar á stovninum og úti í heimunum
- fyribyrgjandi venjingar og viðlíkahaldsvenjingar
- vegleiða og upplæra einstaka brúkaran í nýtslu av ergonomiskum hjálpartólum
- vegleiða og upplæra starvsfólkini á stovninum og í Heimarøktini í nýtslu av ergonomiskum hjálpartólum.

Hevur tú áhuga og helst eisini royndir í arbeiði innan eldraøki? Hevur tú hug til menning og nýhugsan? Ert tú fakliga framsøkin?

Hevur tú góð samstarvsevni, so er avbjóðingin her, og saman við starvsfólkunum sum eru á Dagstovninum eru møguleikar fyri einum spennandi starvi við fyribyrgjandi endamáli.

Bæði størvini eru fulltíðarstørv, og skulu setast 1. okt. 2002.

Lønin er sambært galdandi sáttmálum.

Meira fæst at vita um størvini, við at ringja á Lágargarð, tlf. 316788, og spyrja eftir leiðandi fysioterapeutinum ella leiðandi ergoterapeutinum.

Skrivligar umsóknir og møgulig viðmæli skulu sendast til leiðaran á Lágargarði, Stoffalág 84, Boks 1188, 110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er til 19. aug. 2002.

Sosialurin
Veðrið Bilar Lýsingar
Tíðindi Viðmerkingar
Ítróttur Nøvn Skráir
Tiltøk

## Pedagogur
### til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna undir Hamri verður søkt eftir 1 pedagogi 35 tímar um vikuna at byrja 1. sept. 2002 (ella eftir avtalu).

Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum, og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs, leiðara, tlf. 225222 / 444940.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 19. aug. kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknir ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 1. aug. 2002
**Fuglafjarðar býráð**

## Kvívíkar Skúli
**Søkir eftir lærara til skúlaárið 2002/2003**

Vegna lærara í farloyvi, er eitt tíðaravmarkað starv við Kvívíkar Skúla, skúlaárið 2002/2003.

**Førleikakrøv:**
Lærara, ið serliga kann undirvísa í tónleiki, svimjing/fimleik og annars øllum lærugreinum.

**Um skúlan:**
Kvívíkar Skúli er ein fýraflokkaður skúli við næmingum frá 1. til 7 árgang. Næmingatalið komandi ár er 51. Fimm lærarar eru við skúlan og kemur tú at vera ein teirra. Skúlin er væl útgjørdur við fimleikarahøll, svimjihyli og telduhøli.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meir fæst at vita hjá skúlaleiðaranum, Bjarna Heinesen, tlf. 421291 fartlf. 211504.

Umsóknir við prógvi og viðmælum skulu sendast til Kvívíkar Skúlastýrið í seinasta lagi 9. august 2002 kl. 10.00.

**Kvívíkar Skúlastýrið**
Att: Jan Andreasen
340 Kvívík

## Sláimaskinur

Vit hava sera bíligar sláimaskinur av merkinum Teilburger og Texas á goymslu.

**Sp/f OK Heilsøla & Maskinur**
430 Hvalvík • Tlf. 422394



# Sosialurin 75

Í sambandi við at Sosialurin fyllir 75 ár bjóða vit tær at tekna teg sum haldara fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum og samstundis at vera við í kappingini um hesar báðar vinningarnar:



## 1. Tøm Miklagarð

Í 10 minuttir kanst tú fylla so nógvar vørur í innkeypsvognin í Miklagarði í SMS, sum tú fært stundir til ... men bara eitt av hvørjum.

## 2. Dreymaferð við nýggju Norrönu

Vinn eina familjuferð við nýggju Norrönu hjá Smyril Line fyri 2 vaksin og 2 børn við bili




**Ja** eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum

Navn ____________

Bústaður ____________

Býur/bygd ____________

Tel ____________

e-mail ____________

Send seðilin skjótast gjørligt til:
Sosialurin, Argjavegur 26, 160 Argir
ella faksa hann til fax nr. 314720